# Gevandi og respektfult samstarv

**Vit eru nú í einari tíð, har politiski viljin og áhugin er at spora fyri at bøta um korini hjá teimum sálarsjúku, og tað gleðast vit um – tørvin kenna vit, segði leiðarin fyri Sambýlinum við Heyggjar, Sjúrður Johannesen**



*Sjúrður Johannesen er leiðari á búheiminum við Heyggjar, og hann segði sjálvandi nøkur orð við móttøkuna*

SAMBÝLI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Sambýlið við Heyggjar er fyrsta sambýli av sínum slag í Føroyum, ætlað ungum við sálarligum trupulleikum. Tað er landið, sum hevur latið eini hús, sum Landssjúkrahúsið framman undan ráddi yvir, innrættað til eitt landsheim.

Sambýlið er ætlað fimm búfólkum, men tørvurin er so stórur, at mann hevur valt at taka eitt sætta fólk inn, tí eitt pikkalítið rúm var tøkt. Í løtuni eru tey fýra mannfólk og tvey konufólk, sum eru flutt inn í Sambýlið við Heyggjar.

Á heiminum starvast fimm starvsfólk umframt leiðaran. Saman hava tey sett sær ein fyrisetning við heiminum, har málið millum annað er at fáa búfólkini út á arbeiðsmarknaðin og at arbeitt verður ímóti egnum búskapi. Búfólkini eru millum 18 og 35 ár.

Á móttøkuni hevði leiðarin, Sjúrður Johannesen eisini orðið.

- Tað er ikki heilt uttan stoltleika, at vit vísa okkara hús fram fyri almenninginum í dag. Vit halda, at úrslitið, sum sæst í dag, er ikki av leið, og tað hevur verið vert at bíða eftir, eru vit búfólk og starvsfólk samd um, segði Sjúrður Johannesen.

Hann segði víðari, at tað hevur tikið sína tíð, og at øll hava víst eitt nærum ómenniskjaligt tol, dirvi og arbeiðssemi, meðan arbeiðsplássið var eitt byggipláss. Samstundis legði hann dent á, at tey búfólkini, sum fluttu inn mitt í øllum, høvdu verið fantastisk.

### Byrjaðu í kjallara

- Eg byrjaði mína ferð í psykiatriini av álvara, tá eg varð settur í starv sum leiðari fyri sambýlinum í apríl 2007. Sum sosialráðgevi í skjótt 19 ár havi eg sjálvandi havt ymiskt við psykiatriina at gera, men ikki so miðvíst sum nú, og eg trívist sera væl, segði Sjúrður Johannesen.

Hann segði, at vit nú eru í einari tíð, har politiskur vilji og áhugi er at spora fyri at bøta um korini hjá teimum sálarsjúku, og tað gleðast tey um.

- Og tørvin kenna vit á øllum teimum fyrispurningum, vit hava fingið og fáa um innivist her hjá okkum, segði Sjúrður Johannesen.

Tey byrjaðu mest sum á berum.

- Sambýlið stóð í hávlum gekki, har var ikki innivérandi. Eitt av starvsfólkunum bjóðaði sín kjallara fram og har settu vit okkum sjálvum stevnu og sótu so trúliga í meiri enn ein mánaða og gjørdu eitt konsept, ið vit frá byrjan vildu arbeiða út frá, segði Sjúrður Johannesen.

Hann segði, at tey heilt frá byrjan hava lagt seg eftir einum gevandi og respektfullum samstarvi við allar samstarvspartar.

- Vilja vit okkara búfólki tað besta, hevur tað alstóran týdning, at samstarvið er optimalt. Tað kann eingin vera ósamdur við mær í, segði Sjúrður Johannesen, leiðari á Sambýlinum við Heyggjar.



*Búfólk og starvsfólk hugna sær undan móttøkuni*



*Svenning av Lofti, ið umboðaði felagið Sinnisbata, og Kristian Árnason, vóru til móttøkuna*